90 ára føðingardagur

Í dag fyllir Sanna Joensen, bóndakona uppi í stovu í Hesti 90 ár.

Sanna er ættað av Velbastað. Dóttir Ólav við Á og Theu Malenu fødd Egholm ættað úr Hvalvík.

Systkini vóru 4, Tróndur, Helena, Sanna og Hanna, sum er yngst av systkinum. Í dag eru bara Sanna og Hanna eftir á lívi. Helena doyði fyri einum mánaða síðani 94 ára gomul.

Sanna giftist út í Hest við Hannis uppi í Stovu 20 ára gomul og fingu tey 3 børn saman, Jógvan, Theu og Óla. Sanna hevur sostatt liva úti í Hesti tey seinastu 70 árini og er hon eisini elsta fólk í bygdini í dag.

Tað eru tey heilt fáu, sum koma so høgt upp í árini uttan at hava fingið onkran av lívsins brotasjógvum og soleiðis hevur eisini verið hjá Sannu. Hon var bara 9 ára gomul tá hon misti mammu sína og hon var bara 59 ár tá Hannis doyði og hevur hon sostatt sitið einkja tey seinastu 30 árini.

Fyri fýra árum síðan misti Sanna eldra sonin Jógvan, sum var bóndi. Hann datt oman undir fjallgongu og doyði. Sostatt hevur alt ikki bara verið ein dansur á rósum.

Sanna klárar seg væl av at vera 90 ára gomul. Hon bakar breyð, kókar døgurða og ger alt tað vanliga í húsinum og má tað sigast at vera einastandandi í so høgum aldri.

Spyrt tú Sannu hvussu henni hevur dámt at búð úti í Hesti, so sigur hon hvussu væl sær hevur dámt og hvussu væl Hannis og hon hava liva saman. Tað kann onki vera betur enn at hava góð minni.

Til seinast vil eg ynskja tygum Sannu, hjartaliga tillukku við teimum 90 árunum við bøn um at tygum fáa eitt blítt lívskvøld.

Carl

- Skjót tíðindi
- Fesk tíðindi
- Føroysk tíðindi
- Lesið Sosialin á Internetinum
- Um allan heim
- Alt samdøgrið



Internet Sosialurin

www.sosialurin.fo



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Kirsti Olsen
Box 2008
165 Argir

Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: FRAGDARÍTRIV

F	Ó	T	B	Ó	L	T	S	F	E	P	U	R		U	S
R		A	R		E	E	E		B	A	R	O	K		K
Í	S	P	I	N	N	A	R		B	N		N	Y	S	Ø
S	Ý	T	A		D		A	R	E	N	S	A			T
P	L	I	N	K	U	R		O	S	U	M		O	D	U
A	T		O	A		Ø	R	V	A	R	O	D	D	U	R
R			G	R	A	N	I		N		L	O	D	N	A
K	O	M	M	A		N		E	D	I	T		U		V
S	M	E	I	C	H	E	L			I	S	T	R	I	A
S	A		C	H	E		E	V	A		T	Í		N	R
K			H	I	R	S	I		T	R	Ø	Ð	I	N	
O	M	M	A		I	N	G	I			Ð		T	I	T
T	I	B	E	R	N		A	S	T	R	I	D			O
167	L		L	U	D	O		K	R	Ú	N	B	O	R	G
B	O	S		N	I	D	A	R	O	S				I	U
B	S	A		A	R	A	R	A	T		A	V	K	O	M

Hvønn loygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Loysunar-orðið: **168**

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ Ljósini slókna
- ❑ Søgur úr Port Janua
- ❑ Bíblian í orðum og myndum
- ❑ Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika
- ❑ Mangt er millum himmal og jørð

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið
- ❑ Heimssøga 1
- ❑ Søgan um hini
- ❑ Lív og gróður
- ❑ Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.